# Ongin øl at fáa uttanfyri enn



**Uppskotið um broytingar í rúsdrekkalógini, sum hevur við sær, at tað skal vera loyvt at skeinkja rúsdrekka uttandura, hevur verið til eftirkanningar í Innlendismálaráðnum og er nú komið aftur til Vinnumálaráðið, men tað verður ikki lagt fyri tingið enn, sigur Bjarni Djurholm**

RÚSDREKKALOGIN

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Uttan í heimi kenna vit fortovscaféir, har tað ber til at njóta eina eitt glas av víni ella eina øl, uttan fyri í góðveðrinum.

Hetta ber ikki til í Føroyum í dag. Ofta tí at veðrið ikki loyvir tí, men so tá veðrið einaferð er gott, so er tað ein lóg, ið forðar fyri hesum. Men møguliga verður henda lógin broytt um ikki so langa tíð.

Tí uppskotið um broytingar í rúsdrekkalógini, sum millum annað hevði við sær, at tað fer at bera til hjá skeinkiloyvisinnihavarum at skeinkja sterkt uttandura, er liggur nú aftur í Vinnumálaráðnum.

Áðrenn summarfrítíðina varð tað sent til lógardeildina í Innlendismálaráðnum, har tað skuldi eftirkannast, og nú er tað so afturkomið við smávegis broytingum.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum er í Noregi í løtuni, og hevur ikki sæð broytingarnar, ið Innlendismálaráðið er komið við, og fær tí ikki gjørt viðmerkingar til tað.

Hann sigur tó, at tað ikki verður beinanvegin, at hann leggur uppskotið fram fyri tingið.

– Eg má fara at tosa við umsitingina nú, men uppskotið er ikki á skrá enn, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

# Garvaðir klaksvíkingar í nýggjum bólki

**Feskasta skotið á tónleikapallinum í Klaksvík er bólkurin Pentagon. Men hóast bólkurin er nýggjur, rúmar hann nøkrum av kendastu nøvnunum innan tónleik í Klaksvík. Hetta vikuskiftið fer bólkurin við oddamanninum Karl Martini Samuelsen á pallin í REX**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Karl Martin er ein tann kendasta røddin í Klaksvíksrokki. Hann hevur síðan 70'árini verið røddin í Hjarnum og í øllum møguligum verkætlanum eitt nú Karl Martin og Margretu og Joka.

Í Pentagon hevur Karl Martin funnið saman við nøkrum av fremstu tónleikarunum í Klaksvík. Magna Husgaard á ljómborðið, Mikkjal Hvannastein á gittara, Høgna Klakstein á trummum og unga Jógvani Fróða Baldvinsson á bassi.

Karl Martin greiður frá, at bólkurin er ein dansibólkur og spælir nýggjari og eldri kend løg

– Vit spæla løg hjá útlendskum nøvnum, eisini nýggjari løg sum Have a Bad Day hjá Daniel Powder, men eisini løg hjá t.d. Stevie Wonder og nógvum øðrum. Sjálvandi er eisini pláss fyri onkrum Hjarnar lagi á skránni.

Karl Martin spældi herfyri saman við Hjarnar í Nólsoy á Ovastevnu, men tað er heldur sjáldsamt, at Hjarnar er á palli.

– Sjálvandi sakni eg tær stuttligu løturnar, sigur Karl Martin og viðgongur, at hetta er ein av orsøkunum, at hann fór við í nýggja bólkin.

– Vit spældu saman, tá Norðoyar tunnilin lat upp, og teir eru øgiliga dugnaligir tónleikarar. Hóast teir eru ungir, so eru teir allir royndir úr ymiskum bólkum, so sjálvandi segði eg ja, tá teir bóðu meg koma upp í hendan bólkin, sigur hann.

– Tað gongur ótrúliga væl, tá vit venja. Teir eru øgiliga professionellir, og tað ljóðar beinanvegin væl, tá vit fara í gongd, heldur Karl Martin fram.

Pentagon spælir í REX fríggjakvøldið og leygarkvøldið, men bólkurin hevur longu gjørt avtalu við REX um fleiri spælingar í heyst og í vetur.

– Jú, vit ætla okkum at halda fram við hesum, og hava longu nú fleiri spælikvøld á skránni, sigur Karl Martin Samuelsen, ið tykist til reiðar til aftur at gera um seg í føroyskum tónleiki.



## Hotel Tvøroyri stongt

**Hotel Tvøroyri er fyribils stongt og ógreitt er, nær hotellið letur upp aftur. Eftir øllum at døma er eitt stjóraskifti á hotellinum orsøkin til, at hotellið ikki er opið í løtuni**

HOTEL TVØROYRI

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Edmund Kjærbech hevur verið stjóri á Hotel Tvøroyri seinastu tólv árini. Tað er hann ikki longur, og nýggi stjórin eitur Anna Maria Larsen.

Men nú er Hotel Tvøroyri stongt. Nýggi stjórin sigur, at eigaraskifti hevur verið, og at hotellið er stongt, tí onkrar smávegis broytingar á hotellinum skulu gerast. Tey ætla at opna aftur skjótast gjørligt, sigur Anna Maria Larsen, uttan at koma nærri inn á nær tað verður.

Fyrrverandi stjórin á Hotel Tvøroyri, Edmund Kjærbech, váttar fyri Sosialinum, at hann er givin við øllum virkseminum á hotellinum.

– Eigaraskifti var, og eg varð koyrdur frá sum stjóri. Tí havi eg valt at gevast við øllum virkseminum á hotellinum, er stutta viðmerkingin frá Edmund Kjærbech til málið.

# 200 hátíðarheldur føðingardagin hjá Sambandsflokkinum

Í annað kvøld spæla 200, Marius og Øssur Johannesen í Kagganum, men sambært Niels Arge Galán úr 200 er ikki einans talan um útgávukonsert, men somuleiðis um føðingardagskonsert fyri Sambandsflokkin.

200 fer á síni konsert at heiðra 100 ára haldið hjá Sambandsflokkinum á hesi konsert, skrivar tann vanliga so fullveldissinnaði punksangarin í einum tíðindaskrivi.

Á konsertunum í Vestmanna, Suðuroy, seinasta vikuskiftið sungu 200 Tillukku til tín og róptu hurra fyri føðingardagsbarninum.

**nud**



## Uni tolkar Nyholm á konsert

Uni Debess fer í kvøld at spæla løg av nýggju fløgu síni, Gangi Eg, har hann tolkar yrkingar hjá langabba sínum Nyholm Debess. Konsertin verður í Manhattan.

Talan er um ein Una í heldur øðrvísi samanhangi, enn tann vit kenna hann í. Her er talan um eitt slag av fólkakendum tónleiki, men alíkavæl er ein ávís blúskensla yvir tónleikinum, so Uni stendur ikki heilt á berum.

**nud**